Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon

Eystara Bryggja 30, FO-100 Tórshavn

## Ársfrásøgn

## 2025

**FRUMRIT**

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Upplýsingar um felagið** | |
| Upplýsingar um felagið | 4 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2025** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 5 |
| Rakstrarroknskapur | 7 |
| Fíggjarstøða | 8 |
| Notur | 10 |

## Leiðsluátekning

Nevndin hevur í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2025 hjá Sersambandinum fyri Súkkling og Triathlon.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2025 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning

Tórshavn, tann 11. mars 2026

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Arnfinnur Helmsdal<br>formaður | Andrass Joensen<br>nevndarlimur | Súsanna Skylv<br>nevndarlimur |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til kapitaleigararnar í Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon**

**Niðurstøða**

Vit hava framt víðkaða gjøgnumgongd av ársroknskapinum hjá Sersambandinum fyri Súkkling og Triathlon fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025, sum fevnir um nýttan roknskaparhátt, rakstrarroknskap, fíggjarstøðu og notur. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2025 og av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025 sambært ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Vit hava framt víðkaðu gjøgnumgongdina í samsvari við váttanarstandardin fyri smá virkir. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri lýst í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av víðkaðu gjøgnumgongdini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi og hóskandi prógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum

Tá ársroknskapurin verður gjørdur hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað

**Ábyrgd grannskoðarans fyri víðkaðu gjøgnumgongdini av ársroknskapinum**

Okkara ábyrgd er at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Hetta krevur, at vit leggja til rættis og gera arbeiðið við atliti at fáa avmarkaða vissu fyri okkara niðurstøðu um ársroknskapin og harumframt gera serstøku arbeiðini fyri at fáa størri vissu um okkara niðurstøðu.

Arbeiðið í sambandi við víðkaðu gjøgnumgongdina fevnir í høvuðsheitum um fyrispurningar til leiðsluna og, har tað er gagnligt, onnur starvsfólk hjá felagnum, greiningar og tey serstøku arbeiðini, sum eru áløgd okkum, umframt at mett verður um tey prógv, ið eru fingin til vega.

Vavið av tí arbeiði, ið verður gjørt í sambandi við víðkaða gjøgnumgongd, er minni, enn tá ið grannskoðað verður, og tí geva vit ikki ársroknskapinum eina grannskoðaraniðurstøðu

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Tórshavn, tann 11. mars 2026

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

John Michal Petersen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | |
|---|---|
| **Felagið** | Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon<br>Eystara Bryggja 30<br>FO-100 Tórshavn |
| | Telefon: 216420 |
| | V-tal: 523842<br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Arnfinnur Helmsdal, formaður<br>Andrass Joensen, nevndarlimur<br>Súsanna Skylv, nevndarlimur |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo |

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri flokki A, við neyðugum tillagingum, av tí at talan er um eitt sersamband. Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum (DKK).

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið á ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið á skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## Rakstrarroknskapurin

### Nettosøla

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og við avsláttri í sambandi við søluna frádrignum. Stuðul og aðrar sáttmálatengdar inntøkur verða tiknar við og tíðargreinaðar, samsvarandi sáttmálainnihaldinum.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til raksturin hjá felagnum.

### Starvsfólkakostnaðir

Starvsfólkakostnaðir umfata løn, íroknað frítíðarløn og eftirløn, umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

## Nýttur roknskaparháttur

**Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir**

Fíggjarligir postar umfata rentur, staðfestan og ikki staðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum umframt amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

## Fíggjarstøðan

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---|---|
| 2 | Inntøkur | 801.205 | 574.024 |
| 3 | Oyggjaleikir 2027 | -5.691 | 0 |
| 4 | Úrvalsítrottur | -19.100 | -84.305 |
| 5 | Útreiðslur í samband við skeið | -10.985 | 0 |
| 7 | Landsliðið | -395.647 | -55.318 |
| 8 | Felagsútreiðslur | -36.008 | -12.860 |
| 9 | FM-/landskappingar | -9.972 | -11.117 |
| 10 | Fyrisitingarkostnaðir | -43.703 | -60.326 |
| 11 | Fjallasúkklubreyt | -433 | -237.000 |
| | **Bruttoúrslit** | **279.666** | **113.098** |
| 6 | Starvsfólkakostnaðir | -253.857 | -53.023 |
| | **Rakstrarúrslit** | **25.809** | **60.075** |
| | Øvrige finansielle omkostninger | 0 | -8 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **25.809** | **60.067** |
| | **Ársúrslit** | **25.809** | **60.067** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | | |
|---|---|---|
| Flytast til flutt úrslit | 25.809 | 60.067 |
| **Býtt tilsamans** | **25.809** | **60.067** |

## Fíggjarstøða 31. desember

### OGN

| Nota | | 2025 kr. | 2024 kr. |
| --- | --- | --- | --- |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Tøkur peningur | 414.040 | 388.231 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **414.040** | **388.231** |
| | **OGN TILSAMANS** | **414.040** | **388.231** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**SKYLDUR**

| Nota | | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 12 | Flutt úrslit | 414.040 | 388.231 |
| | **Eginogn tilsamans** | **414.040** | **388.231** |
| | | | |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **414.040** | **388.231** |

**1 Høvuðsvirksemi sambandsins**

## Notur

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---:|---:|

**1. Høvuðsvirksemi sambandsins**

Endamál sambandsins er at menna og skapa áhuga fyri súkkling og triathlon í Føroyum, og í hesum sambandi skipa fyri tiltøkum og tilíkum.

**2. Inntøkur**

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---:|---:|
| Landskassastudningur frá ÍSF | 563.522 | 468.811 |
| Lands/FM kappingar - Luttøkugjald | 5.973 | 5.213 |
| Inntøkur fyri skeið | 5.600 | 0 |
| Stuðul til Úrvalsítrott | 0 | 100.000 |
| Aðrar inntøkur | 226.110 | 0 |
| | **801.205** | **574.024** |

**3. Oyggjaleikir 2027**

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---:|---:|
| Venjaraløn | 5.000 | 0 |
| Ferðakostnaður í FØ | 435 | 0 |
| Kostur í FØ | 256 | 0 |
| | **5.691** | **0** |

**4. Úrvalsítrottur**

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---:|---:|
| Venjaraløn | 0 | 9.800 |
| Ferðakostnaður í FØ | 0 | 3.743 |
| Uppihald í FØ | 0 | 3.000 |
| Ferðakostnaður | 0 | 35.888 |
| Uppihald í útlandinum | 0 | 6.734 |
| Kostur í útlandinum | 0 | 17.400 |
| Annað | 19.100 | 7.740 |
| | **19.100** | **84.305** |

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|

**5. Útreiðslur í samband við skeið**

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| Samsýning til skeiðshaldara | 5.600 | 0 |
| Hølisleiga | 600 | 0 |
| Annar kostnaður | 4.785 | 0 |
| | **10.985** | **0** |

**6. Starvsfólkakostnaðir**

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| Lønir | 236.065 | 45.444 |
| Eftirlønargjøld | 13.769 | 4.962 |
| Samhaldsfasti, Barsilsgjald, ALS | 4.023 | 2.617 |
| | **253.857** | **53.023** |

**7. Landsliðið**

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| Mannslandsliðið - Venjarasamsýning | 11.340 | 0 |
| Mannslandsliðið - Ferðakostnaður | 160.673 | 18.233 |
| Mannslandsliðið - Uppihald í útlandinum | 87.269 | 37.085 |
| Mannslandsliðið - Kostur í útlandinum | 16.759 | 0 |
| Mannslandsliðið - Kostur í FØ | 110 | 0 |
| Mannslandsliðið - Búnar, og líknandi | 69.098 | 0 |
| Mannslandsliðið - Annað | 14.417 | 0 |
| Kvinnulandsliðið - Ferðakostnaður | 24.063 | 0 |
| Kvinnulandsliðið - Uppihald í útlandinum | 5.440 | 0 |
| Kvinnulandsliðið - Annað | 6.478 | 0 |
| | **395.647** | **55.318** |

**8. Felagsútreiðslur**

| | 2025 kr. | 2024 kr. |
|---|---|---|
| Ferðakostnaður | 3.000 | 0 |
| Fundarútreiðslur | 14.058 | 2.955 |
| Annað | 2.540 | 200 |
| Útgerð | 4.140 | 1.780 |
| Gávur og graveringar | 523 | 0 |
| Høliskostnaður | 7.500 | 5.000 |
| Trygging | 2.072 | 0 |
| Limagjøld | 2.175 | 2.925 |
| | **36.008** | **12.860** |

| | | 2025<br>kr. | 2024<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **9.** | **FM-/landskappingar** | | |
| | Dómarar | 5.631 | 4.131 |
| | Útreiðslur til vørubil | 431 | 1.090 |
| | Heiðursmerkir | 1.182 | 115 |
| | Annað | 2.728 | 5.781 |
| | | **9.972** | **11.117** |
| **10.** | **Fyrisitingarkostnaðir** | | |
| | Telefon og internet | 14.505 | 14.612 |
| | EDV-kostnaðir | 3.540 | 3.348 |
| | Tól, teldur og annað | 0 | 13.345 |
| | Uppsett og grannskoða ársfrásøgn | 20.844 | 24.375 |
| | Starvsfólkakostnaður | 1.500 | 2.008 |
| | Aðrir kostnaðir | 3.314 | 2.638 |
| | | **43.703** | **60.326** |
| **11.** | **Fjallasúkklubreyt** | | |
| | Fjallasúkklubreyt | 433 | 237.000 |
| | | **433** | **237.000** |
| **12.** | **Flutt úrslit** | | |
| | Flutt úrslit primo | 388.231 | 328.164 |
| | Flutt úrslit í árinum | 25.809 | 60.067 |
| | | **414.040** | **388.231** |